## DAGSINS MEINING

# Fleiri ódámligir jólapakkar frá samgonguni

Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin halda fram at senda Føroya fólki fleiri ódámligar og asosialar jólapakkar:

- **Færri pengar í samband við barsilsorlov!**
- **Endurgjaldið fyri barnapening skal burtur!**
- **Mjólkin skal gerast dýrari!**
- **Minstualøn fiskimanna skal skerjast!**
- **Dagpeningaskipanin skal ikki gjalda fyrsta sjúkradagin!**
- **Játtanin til fólkapensjón skal lækkast!**

**Harafturat sendir Miðflokkurin – flokkurin við trivnaðar- og familjumálum ovast á breddanum – aftur í ár sinisveik heim av Deild 1. Ikki bara á jólum. Nei, í 17 dagar, hóast jólahøgtíðin er tann tyngsta fyri tey sinnisveiku!**

Orðaskiftið á tingi týsdagin avdúkaði einaferð afturat, at tann sosiala tilvitanin hjá samgonguni er á einum ógvuliga lágum stigi. Ikki ein samgongulimur – heldur ikki tjóðveldiskvinnurnar – setti eina atfinningarsama viðmerking til uppskotið hjá Bjarna Djurholm og Vinnumálaráðnum at broyta barnsburðarskipanina.

Skipanin skal broytast, hóast hon bara hevur virkað í eitt ár, tí summar kvinnur fáa meira útgoldið í barnsburðartíðini, enn tær vanliga forvinna. Orsøkin er, at eitt seks mánaðarskeið verður brúkt sum útrokningargrundarlag. Tað merkir, at hevur ein kvinna t.d. fingið frítíðarløn og kanska nógva yvirtíð útgoldið í einum tíðarskeiðið, so ávirkar tað útgjaldið í barnsburðarfarloyvistíðini uppeftir, og tað má ikki henda!

Men broytingin fær serliga avleiðingar fyri tey tímaløntu. Í orðaskiftinum nevndi tingmaðurin Marius Dam, sum sjálvandi veit tað frá læknastarvi sínum, at flakakvinnur hava ofta sjúkradagar, meðan tær eru við barn. Hetta hevur ta avleiðing, at tær tíðarskeiðinum, sum liggur til grund fyri útrokningunum, hava eina lægri inntøku enn vannligt. Og tað merkir, at tey fáa minni í barnsburðartíðini, tá tey annars hava brúk fyri hvørjum oyra. V.ø.o. merkir eisini hetta uppskotið hjá borgarliga yvirtøkulandsstýrinum, at tað “vendir tann tunga endan niðureftir”.

Tað er lítil uggi í viðmerkingunum til uppskotið at leggja dent á, at barnsburðarfarloyvi skal leingjast upp í 52 vikur – tó uttan peningaligt endurgjald – tá útgjaldið verður minni hjá teimum tímaløntu barnakvinnunum, sum frammanundan forvinna minst, og sum hava mest brúk fyri einum sømiligum útgjaldi. Men hvat, tjóðveldiskvinnurnar forvinna jú meiri enn 30.000 kr. um mánaðin, so hví skulu “bekymra” seg um henda spurningin? Aftur eitt dømi um ein asosialan jólapakka frá landsstýrinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Um at spara

**Heri Mohr**



…er mest sum ein býur eysturi í Sibiria, tá ið talan er um sparing av skattapening í pinkulingaríkinum einastaðni í Norðuratlantshavinum á 62. breiddarstigi.

Her verður hugsað um orðaskiftið, sum nú fer fram á okkara høga løgtingi, um løgtingsfíggjarlógina 2003. Vit hava í 5 ár upplivað eitt støðugt vaksandi bureaukrati, ið, sum ein shíkur av versta slag, sígur pening og lívsmegi úr teimum, sum í ríkinum balast. Í hesum nevnda tíðarskeiði er umleið ein milliard til tað almenna løgd omaná byrðu á fólksins krøkta rygg og smokkaðar heðrar. Men at brúka pening, sum lógfest er ætlaður ávís øki í samfelagnum, til onnur endamál, tykist ikki at volda samvitskubit hjá teimum, sum fyri borgum ráða: Av tí sum eftir er av blokkinum úr ríkiskassanum, ætlar gevarin t.v.s. staturin, at 117 milliónir sambært lóg skulu brúkast til serforsorg, men hóast hetta, so ætlar landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, at einans 108 milliónir skulu brúkast til tað ætlaða endamálið, meðan meirilutin í fíggjarnevndini er av teirri á skoðan, at tað er alt ov nógv, og vil tessvegna lækka upphæddina hjá landsstýrismanninum við 3.6 milliónum, og soleiðis kunnu 13.6 milliónur av teimu 117 milliónunum, sum ríkiskassin hevur játtað til serforsorgina í Føroyum, brúkast til okkurt annað, hvat tað so kann vera?

Ella: Av tí sum eftir er av blokkinum úr ríkiskassanum, ætlar gevarin, t.v.s. staturin, at 283.6 milliónir skulu brúkast til heilsuverkið, og av hesi upphædd eru umleið **223 milliónir ætlaðar okkara trimum sjúkrahúsum psykiatriskadeild** viðroknað. Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2003 ætlar landsstýris-maðurin við fíggjarmálum, at 358.1 milliónir skulu brúkast til sjúkrahúsini, meðan meirilutin í fíggjarnevndini er av teirri áskoðan, at 347.2 milliónir er nóg mikið. Av hesi upphædd rindar **ríkiskassin** sum sagt umleið **223 milliónir** og **landskassin** so statt munin, nevniliga umleið **124 milliónir** ella 99 milliónir minni enn tað, ið ríkiskassin letur til sama málsøkið. Blokkstuðulin til sjúkrahúsverkið hevur støði í býtinum: sjúkrahúsini 50% landið og 50% staturin, meðan psyki-atriskadeild (statssjúkrahúsið) verður goldið 100% av statinum.

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2003 hevur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum mælt til, at fíggjar-, fiski-, vinnu-, menta-, olju-, familju- og heilsu.-, almanna- og løgmálaráðið fáa 97 milliónir at ráða yvir, meðan meirilutin í fíggjarnevndini er samd um, at her má sparast við ikki minni enn 1 millión, ella við einum prosenti ! Í fjørð játtaði løgtingið 86.6 milliónir til somu ráð (sum tá høvdu heitið stýri) men nú skal løgtingið ætlandi játtað ráðunum (stýrunum) 11% meira enn í fjør.

Í meira enn ein hálva øld hevur løgtingið játtað pening til Mentanargrunnin, sum varð stovnaður við løgtingslóg seinast broytt í mai 2000. Ein politisk vald nevnd við einum skrivara og einum kassameistara hava øll hesu mongu ár umsitið inntøkur og útreiðslur grunnsins. (Undirritaði var kassameistari í 25 ár og fekk fyri hetta lítið krevjandi arbeiði, minnist eg rætt, 6.000 krónur um árið, og grunnurin kravdi valla meira enn einar 2o túsund til tað árligu umsitingina). Nú síggja vit, at meirilutin í fíggjarnevndini vil játta eina kvart millión til umsiting av Mentanargrunninum, ella ein hækking uppá 1000% (túsund prosent). Tað er kanska skeivt at tosa um hækking, tí til dagin í dag hevur løgtingið ongantíð játtað pening til umsiting av umrødda grunni, sum hevur meira enn 50 ár á baki.

O gev okkum í dag okkara dagliga breyð, frelsu og sjálvberandi olju , og leingi livi serføroyskur stórlætisørskapur og ikki minni: leingi livi ný- og serføroyska bureaukratmentan dynjar í hvørjum skýmakróki.

Gávi satt at orð Grundtvigs: »På det jævne, pð det jævne, ikke i det himmelblå« aftur fingu ljóð í Føroyum, og at vit ongantíð fara at gloyma at ynskja hvør øðrum gleðilig jólø

# Viðmerking til Karten Hansen, landsstýrismann

**Bóndafelag Føroya**
*Bjørn Patursson, formaður*



Karsten Hansen, landsstýrismaður sigur, at vinnan væl kann bera avgjaldshækkingar og niðurskurðir í fíggjarlógini, eftir at njóta gott av lágum partafelagsskatti. Her er tað bara so, at stórsti parturin av vinnuliga landbúnaðinum ikki fær hendan ágóðan av tí at festibóndir eru avskornir frá at reka garðin í partafelagi, so livandi galið er tað.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Tit røra hvørki Skansan ella Tinganes

**Jógvan Arge**
*býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*



Tað er tekin um, at menningin innan ferðaskipaferðsluna ikki er tikin í nóg stórum álvara, at embætismenn og politikarar í Tórshavnar Býráð eru farnir at tosa um at sprongja burtur av Skansanum og sjálvum Tinganesi.

Hesar ætlanir koma undan kavi, tí at tvey stór ferðamannaskip skula hava regluliga sigling upp á Havnina. Tosið um at sprongja sær pláss til skip og bilar bendir á, at fóturin verður ov stórur til skógvin.

Mær líkar ikki, at meiri dynamitt verður brúkt til at sprongja burtur av Skansanum, og mær líkar als ikki, at menn fara at nálgast upp at sjálvum Tinganesi við dynamitti og perlum.

Skansin og Tinganes eru givnar fortreytir í Tórshavnar Havn, og tað eiga bæði teknikarar og politikarar at virða. Í mínum hjarta eru tey bæði at meta sum halgidómar fyri býin.

Málið um, hvussu umstøðurnar verða, nú ein stór "Norrøna" metsum dagliga og ein stórur "Smyril" fleiri ferðir dagliga skula inn í Tórshavnar Havn, hevur ikki fingið ta viðgerð, sum eitt so stórt álvarsmál eigur at fáa í einum býráð.

Fyri mær at vísa seg hevur havnarnevndin mestsum ligið omaná hesum málinum. Onkur slintra er stundum tveitt fyri teknisku nevnd og onkur onnur fyri byggi- og býarskipanarnevndina, men ongantíð hevur borið býráðnum sum heild til at fingið eitt samlað tilmæli og enn minni eina samlaða frágreiðing.

Skal ikki siga, at ikki onkur alibifundur er hildin til tess at halda ringasta áganginum frá hurðini, men tað hevur ikki verið í kompententum organum.

Vit hava frætt, at menn hava verið til siglingarroyndir í einum modelbrunni í Keypmannahavn og til ferðslusimulering í Hørsholm. Slíkar royndir geva góð og vánalig úrslit alt eftir, hvat tú fóðrar tólini við.

Vit hava skilt, at tær royndir, sum hava verið gjørdar at byggja saman við Smyril Line, Strandferðsluni og landinum, eru allar dotnar fyri bakka.

Og vit eru í hesum døgum vitni til, at myndugleikar og stovnar hvør eftir annan standa fram og siga, at hetta er ikki nóg gott, sum gjørt verður í Tórshavnar Havn, nú so stórar ferjur skula sigla upp á Havnina.

Undir slíkum umstøðum er tað ikki meir enn rímuligt, at býráðslimir, sum kenna seg ótryggar við ætlanirnar, gera vart við seg og vilja hava eina djúptøkna frágreiðing og viðgerð í sjálvum býráðnum.

Vit skula vónandi framvegis liva og virka væl í Havn - eisini eftir at tey stóru skipini eru komin.

Og vit noyðast at leggja nógv meiri dent á planlegging av havnarbygging aðrastaðni í kommununi, enn júst inni í tronganum kring vágirnar í Havn.

Kaldbaksfjørður og Kollafjørður eru væl ikki bara til pynt.

# Bóndafelag Føroya mótmælir skerjing á fíggjarlógini

**Bjørn Patursson**
*Bóndafelag Føroya*

Vegna Bóndafelag Føroya mótmæli eg harliga, at fíggjarnevndin hevur skori niður uppá stuðulin til landbúnaðin á fíggjarlógini, frá 14,1 mill. til 12,1 mill, ella 14%.

Til tess, at grundgeva fyri frammanfyri standandi mótmæli dagfest 15/12-2002, vil eg framleggja soljóðandi viðmerkingar:

Stórur ágangur er á landbúnaðarstuðulin. Serstakliga síðani myndugleikarnir aftaná kreppuna hava arbeitt við at loysa høvuðsvinnu okkara fiskivinnuna burtur úr stuðulshaftinum. Nú verður so skorið yvir ein kamb og sagt verður, at øll vinna skal verða stuðulsfrí. Fyri landbúnaðin verður hetta nú gjørt í óðum verki, tí sum sagt verður av fíggjarnevndini, vit mugu hava ráð til fullveldið, og annars skylda fíggjarnevndarlimir uppá hvønn annan uttan at hava nøkur tíðandi argument, mál ella mið.

Men fíggjarnevndin gloymur at landbúnaðurin hevur ikki somu kor sum eitt nú fiskivinnan. Hetta er veruliga at hála teppi undan í óðum verki. Krøvini eru, at landbúnaðurin skal kappast upp í móti kappingarneytum sum longu í útgangstøði eru nógv betri fyri enn vit. Fyri tað fyrsta vegna náttúrubornar umstøður, men so sanniliga eisini nógv betri fyri hvat stuðuli viðvíkur, -bæði fíggjarliga, sosialt og verjuliga. Íslendskir politikarar tora at standa fram og verja seg og síni áðrenn innflutt verður frá øðrum og ES múrarnar kenna øll, teir avgera sjálvir hvør sleppur inn og út. Eingin ryggur er í okkara politikarum, sum heldur ofra landbúnaðin fyri atgongd til ES-marknaðin, fyri síðani at lata hann bløða spakuliga í tí skuffuni har einki hendur...

Beinleiðis stuðulin til landbúnaðin er brúkarastuðul sum verður goldin til tess at halda prísin á matvørum til brúkaran niðri. Sagt verður mangan at landbúnaðarvørur í Føroyum eru dýrar, men samanlíkna vit føroyska landbúnaðarstuðulin (brúkarastuðulin) við stuðulin í grannalondum okkara skuldu tær 12,1 mill. verið:

| | | |
|---|---|---|
| - Samanlíkna við Noreg | kr | 145 mill. |
| - Samanlíkna við Ísland | kr. | 166 mill. |
| - Samanlíkna við Danmark | kr. | 96 mill. |

ES-umsøkjaralondini eru ovurfegin um tey fáa 50% av stuðlinum sum danski bóndin fær og tað skilji eg væl..

Ikki tí eg eri samdur í, at framleiðslustuðul er ósunnur og ikki nakað at dúva uppá. Best er um allar vinnur kunnu virka eftir frælsu marknaðarkreftunum, um tað er eingin ivi.

Men áðrenn eg vil loyva mær at leggja nøkur argument fram um hví eg metið at stuðulin til landbúnaðin ikki skal skerast nú vil eg undirstrika, at hesin umtalaði stuðulin uppá 14,1 (skorin niður til 12,1) allur sum hann er er brúkarastuðul, t.v.s. til tess at halda prísinum til brúkaran niðri. Hetta vil so aftur siga at verður stuðulin skorin fer prísurin á búnaðarvørum t.d. mjólk sum fær ca. 75% av stuðlinum, upp smsvarandi.

Og tó, so leingi sum tað almenna eigur landsjørðina haldi eg als ikki at festibóndur skulu hava ringa samvitsku at móttaka stuðul, tí soleiðis sum skipanin er, er hetta ikki at meta meir enn ein lítil kompensatión fyri tað arbeiðið teir leggja í ogn hins almenna.

Men har er tó langt eftir á mál fyri landbúnaðin. Vit kunnu ikki samanbera landbúnaðin við fiskivinnuna. Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna og kappast ímótið øðrum fiskivinnutjóðum á líkaføti. Vit hava entá vunnið kappingina og liggja á odda. Fyri at náa hesum máli hava vit síðan landið broyttist frá at verða eitt bóndasamfelag til eitt fiskivinnusamfelag ført ein miðvísan fiskivinnupolitik, ikki bara her á landi, men syrgt fyri at okkara fiskavirkir hava kunna selt sínar vørur á altjóða marknaðunum á líkaføtið við aðrar. Hetta hevur meir enn einaferð kosta landbúnaðinum, men ikki kann sigast at okkara politikarar á sama hátt hava gjørt stórvegis fyri at skapa góðar og tryggar karmar um landbúnaðin, heldur tvørtur ímótið so følist lógin um landsjørð meir og meir sum eitt kvørkratak fyri festibóndur sum mugu arbeiða undir hesi órgreiðu og niðurgerðandi skipan.

Undir kreppuni fór mong fyritøka undir hamaran. Flakavirkir lótu aftur, skip vóru seld og fólk fluttu av landinum. Landskassin misti nógvan pening fyri teimum veðhaldum politikarar okkara høvdu sett okkum fyri. Vit kallaðu hetta fyri sanering og mong vóru sum komu undir hetta heitið sanering. Tað eru familiur sum tann dag í dag sita hart í tí av hesum orsøkum.

Búnaðarvinnan er ein vinna sum brúkar langa tíð at umskipa seg og hevur tí kanska ikki verið útsett fyri so ógvusligum rembingum sum eitt nú fiskivinnan og alivinnan. Men serliga er tað festiskipanin sum hevur forða fyri at landbúnaðurin ikki hevur verið ígjøgnum hesa somu proses. Festibóndur eru at samanlíkna við embætismenn, tó við tí muni, at vit hava onga fasta løn, eftirløn ella sjúkratrygd. Hartil eru ognaðarviðurskiftini so at vit í flestu førum heldur einki eiga í fyritøkuni vit byggja upp tíðans heldur húsunum vit búgva í. Í sinasta lagi tá bóndin fyllur 70 er føðingardagsgávan út á gøtuna. Av tí at tað er sami juridiski persónur sum eigur og fíggjar eru allar marknaðarkreftirnar settar úr gildið og bóndin húskallur á egnum garði.

Hyggja vit eftir londunum uttanum okkum sæst, at allastaðni verður stuðul veittur til búnaðarframleiðslu. Hetta er tí at londini hava sett sær sum mál at framleiða so nógv av matvørum sum tilber í egnum landi. At framleiða matvørur úr jørðini er ikki sum onnur vinna har tú gert íløgur í framleiðslutól ella keypur skip og ferð út at fiska. Krøvini eru ómetaliga stór. Vit skulu standa inni fyri framleiðsluni frá sáði/giting til heysting/slaktið er á borðinum og peningurin brúkarin vil rinda fyri mat gerst minni og minni av inntøkuni.

Somuleiðis seta politikararnir krøv um at bóndur skulu varðveita eitt ávíst bústaðarmynstur, siðsøgu og røkja land og umhvørvið úr fjøru til fjals. Alt hetta hevur í gjøgnum øldir skapt virðir sum skjót eru at bróta niður um vit í óðum verki sláa skorðurnar undan. Áður enn pilka verður við skorðurnar má ein politikkur leggjast, mál setast og spurningar svarast. Hvørji mál seta vit okkum, hvat viðføra hesi mál og vilja vit gjalda kostnaðin av at røkka hesum málum.

Tá landsstýrismaðurin í landbúnaðarmálum legði uppskot um skuldasanering fyri tingið var sagt at løgtingið einki vildi gera við landbúnaðin fyrenn ein framtíðarætlan fyri landbúnaðin var løgd fyri tingið soleiðis at tinglimir greitt sýggja hvat ætlanin er fyri framtíðina. Men tá hetta var gjørt kundi táverðandi samgonga ikki taka undir við ætlanini, og nú tekur løgtingsins fíggjarnevnd í óðum verkum og sker niður uppá stuðulin uttan mál ella mið og ímótið ráðgeving frá landsstýrismanninum. Halda politikararnir at tað er alneyðugt at skera tann, í mun til grannar okkara lítla stuðulin landbúnaðurin fær niður, er neyðugt áðrenn hetta verður gjørt at fáa støðuna hjá hesi niðurpíndu vinnu til viðgerðar. Tá tað er frá hondini kunnu vit taka stuðulskipanirnar upp til viðgerðar..

Ein annar máti at samanlíkna okkum við grannar sær soleiðis út:

| Land: | Stuðul pr. íbúgva Kr: |
|---|---|
| Noreg | 3.020 |
| Ísland | 3.460 |
| Danmark | 2.000 |
| Føroyar | 260 |

**Viðv: beinleiðis landbúnaðarstuðul í Noregi og Íslandi og Danmark.**

**Noreg:** Í statsbudgettinum fyri 2000 verður goldið í beinleiðis stuðuli kr. 12.978.343.000 Nkr. Tað búgva áleið 4.300.000 fólk í Noregi so tað verður Nkr. 3.018 pr. íbúgva. Sambært keldum í Noregi er budgetti fyri 2002 = 12.170.289.000 Nkr.

Legg til merkis at hetta bert er beinleiðis stuðul tvs. at samanlíkna við tær kr. 14,1 (nú 12,1) ella so hjá okkum ella tað sum stendur beinleiðis til vinnuna!!!

**Ísland:** Frá keldum í Íslandi havi eg fingið upplýst at beinleiðis stuðulin til íslendska landbúnaðin er ísl. Kr. 9 milliardir (harav mjólk 4 milliardir). So vítt eg kenni til Íslandi búgva tað eini 260.000 íslendingar í Íslandi so tað gevur ca fkr. 3460 pr. íbúgva. Ísland hevur hartil innflutningstoll sum verður mettur sum landbúnaðarstuðul, teir liggja á 5 plássi á hesum øki beint aftaná: nr.1 **Noreg**, nr. 2 **Sveits**, nr. 3 **Suðurkorea**, Nr. 4 **Japan**, Nr. 5 **Ísland**.

**Danmark** er kr. 2.000, men tað er nokk ikki heilt up to date (frá ár 1999).